Borgarstjórin í Nólsoy:

# Framleiðir sólorku til egið húsarhald

**Tað er ikki bara við vindmyllunum í Vestmanna, at øðrvísi og alternativ orka í hesum døgum verður framleidd. Borgarstjórin í Nólsoy, Jógvan Thomsen, hevur síðani mars 2001 framleitt sólorku til egið húsarhald, og higartil eru úrslitini sambært Jógvani Thomsen frálík. - Hesin framleiðsluháttur er meiri støðugur enn vanliga skipanin, og um 10 ár skuldi tað eisini loyst seg fíggjarliga, sigur borgarstjórin**



*Hesir eru sólfangararnir á húsunum hjá borgarstjóranum í Nólsoy, Jógvan Thomsen. - Við sólfangarunum fái eg heitt vatn í kranarnar, og um eini 10 ári skuldi tað eisini loyst seg fíggjarliga, umframt at talan er um støðugari orkuframleiðslu, sigur Jógvan Thomsen*

ORKUFRAMLEIÐSLA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Nógv hevur verið sagt og skrivað um sp/f Røkt og verkætlan teirra við vindmyllunum í Vestmanna. Alternativi orkuframleiðsluhátturin er á mangan hátt eitt nýtt kapitull á hesum øki, hóast SEV hevur havt eina vindmyllu standandi á Toftum í 10 ár og fyrsta vindmyllan í Føroyum kom upp at standa fyri heili 25 árum síðani, tá Birgir Enni á Tvøroyri tók stig til hetta.

Men tað er ikki bara í Vestmanna, at øðrvísi hættir verða royndir at framleiða orku, tí borgarstjórin í Nólsoy og stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum, Jógvan Thomsen, tók fyri tveimum árum síðani stig til egna framleiðsla við sólfangarum í privathúsum sínum.

## Rindaði 18.000 krónur

- Eg skuldi útvega einum kenningi nakrar sólsellur, og sat eg tískil á alnótini og leitaði. Tilvildarliga datt eg fram á nakrar sólfangarar, og hetta helt eg vera áhugavert, greiðir Jógvan Thomsen frá. Hann fekk so sólfangararnar til Føroya fyri 18.000 krónur og byrjaði sjálvur at framleiða orku til egið húsarhald.

Jógvan Thomsen setti sjálvur sólfangararnar í, men hevði hann tó brúk fyri einum elektrikara at fremja eina íbinding, so á henda hátt tykist tørvur vera lítil fyri hjálp uttanífrá, um ein ætlar at royna tað sama.

- Við hesi skipan fái eg heitt vatn í kranarnar, og um eini 10 ári skuldi tað eisini loyst seg fíggjarliga, umframt at talan er um støðugari orkuframleiðslu, sigur Jógvan Thomsen.

Hann vísir á, at hugskotið eisini kom av, at ein granni í Nólsoy hevði roynt tað sama við primitivari amboðum, har hann við einum radiatori og thermorúti fekk hitað vatnið í húsarhaldinum, tá sólin var frammi.

Jógvan Thomsen greiðir víðari frá, at hesir sólfangarar ikki eru annað enn isoleraðir radiatorar. Av hita frá sólarljósi fer ein pumpa í gongd, sum flytir heita vatnið úr sólfangaranum og inn í ein tanga á 250 litrar, sum so sendir heita vatnið víðari kring húsið.

- Automatiska sirkulatiónin riggar avbera væl, og satt at siga hugsa vit ikki um, at talan er um eina øðrvísi skipan í húsarhaldinum, vísir Jógvan Thomsen vælnøgdur á.

## Eingin trupulleiki um veturin

Stóri spurningurin er so, hvussu húsarhaldið megnar ein kaldan og myrkan vetur, um heitt vatn bert fæst gjøgnum sólarljós, men sambært borgarstjóranum í Nólsoy er hetta eingin trupulleiki.

- Tað er als ikki neyðugt við beinleiðis sólskini. Tað einasta, sum krevst, er vanligt dagsljós fyri at fáa hita, sigur Jógvan Thomsen. Í desember og januar minkar nøgdin av heitum vatni úr sólfangarum í tangan, men tá hevur húsarhaldið sjálvsagt eina oljufýring eins og onnur.

- Henda skipan við sólorku er støðugari, tí tangin tekur sum sagt 250 litrar av vatni, sum heldur sær heitt, meðan ein vanlig oljufýring bert tekur 100 litrar og skal regulerast, tá hon er tóm og kalt vatn kemur í, slær Jógvan Thomsen fast.

Sostatt er fyrimunurin við hesum hátti, at nøgdin av heitum vatni fyrst og fremst er størri enn áður, og at tað tískil ikki er neyðugt at regulera og hava eyguni við skipanini, sum neyðugt er við vanligari oljufýring.

- Eg havi stórt sæð ikki gjørt nakað við tangan ella sólfangararnar, síðani eg setti teir upp í mars 2001, og um 10 ár skuldi hesin háttur eisini loyst seg fíggjarliga. Tað er bert á hávetri, at skipanin ikki hevur tann stóra vinningin, sigur borgarstjórin í Nólsoy at enda.



*- Tað var meiri ella minni av tilvildarligum orsøkum, at eg kom fram á nakrar sólfangarar á alnótini, og eftir at hava rindað 18.000 krónur fyri teir, fær húsarhaldið í dag hita gjøgnum sólorku, sum bæði er bíligari og betri, sigur Jógvan Thomsen, borgarstjóri í Nólsoy*

# Kommunurnar áhugaðar í sólhitaskipanum

**Eyðun Lauritsen av Skipanesi hevur í fleiri ár arbeitt at fáa sólhitaskipanir til Føroya, og hevur hann nýtt tølini hjá omanfyri nevnda Jógvani Thomsen sum grundarlag. Sambært honum eru kommunur og almennir stovnar áhugað at royna umhvørvisvinarliga og bíliga orkuframleiðsluháttin**

ORKUFRAMLEIÐSLA
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Tær sonevndu Batec sólhitaskipanirnar, sum verða framleiddar í Danmark, verða møguliga at síggja ymsastaðni í Føroyum í framtíðini.

- Við sera góðum úrslitum verða hesar sólhitaskipanir nýttar í londum við so ymsum veðurlagi sum t.d. Uganda og Grønlandi, og tískil eru tær avgjørt hóskandi til føroyskt brúk, sigur Eyðun Lauritsen av Skipanesi, sum hevur arbeitt við sólorkuframleiðslu í fleiri ár, og hevur hann eisini ætlanir at fáa sólhitaskipanir framleiddar í Føroyum í nærmastu framtíð.

Úrslitini, Jógvan Thomsen er komin fram til, eru nýtt sum grundarlag í kanningunum hjá Eyðuni, og er hann bjartskygdur fyri øktari sólorku í Føroyum. Hann hevur fundast við landsstýrismannin í orkumálum, Eyðun Elttør, Føroya Náttúruverndarfelag og aðrar viðkomandi deplar.

## Bíligari og minni dálkandi

Hesar sólhitaskipanir eru sambært Eyðuni Lauritsen bæði bíligari og umhvørvisvinarligari.

- Útlátið av CO2, NOx og SO2 verður minkað munandi, og um sólmóttakararnir fáa gróðrarlíkindi í Føroyum, nærkast vit alsamt krøvunun í Kyoto-sáttmálanum, Geneve-avtaluna og Brundtland-sáttmálanum, vísir Eyðun Lauritsen á.

Sambært honum er talan um eina útreiðsluneutrala íløgu. Kostnaðurin á eini slíkari hitaskipan til vanlig sethús við familju er millum 27.000 og 55.000 krónur, men skattafría sparingin er longu frá fyrsta ári størri enn rentur og avdráttur av einum møguligum láni til eina Batec sólhitaskipan.

- Ein greining gjørd av Teknologisk Institut vísir, at afturgjaldingartíðin til ein sólmóttakara er vanliga 8-9 mánaðir, sigur Eyðun Lauritsen.

## Grannalondini stuðla

Víðari verður víst á, at í grannalondum okkara verður stuðul latin upp til 30% av kostnaðinum í hesi skipan, og fáa fyritøkur og privatpersónar í Føroyum sama stuðul frá landsins myndugleikum í royndunum at lúka altjóða umhvørviskrøvunum, kunnu sólhitaskipanir saktans gerast ein vinningur fyri føroyska samfelagið.

Enn er einki partafelag stovnað, og Eyðun Lauritsen hevur av egnum eintingum arbeitt við verkætlanini og bjóðað sólhitaskipanir til fleiri kommunur og stovnar, sum hava víst stóran áhuga, hóast eingin enn hevur tikið sólhitaskipanina í nýtslu.



# Innrás av sendiharrum

**Í hesum døgum vitja ikki færri enn 25 sendiharrar úr londum kring allan heimin. Hetta er helst fyrstu ferð, at flestu ráðharrarnir vitja í Føroyum. Á ferðini er mangt og hvat á skránni, og leygardagin gongur so leiðin úr aftur Føroyum**



*Ikki færri enn 25 sendiharra vitja í hesum døgum í Føroyum. Her eru tey avmyndað, tá tey stukku inn á gólvið hjá Tórshavnar Býráð*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

SENDIHARRAVITJAN
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Teir 25 sendiharrarnir, sum nú eru komnir til Føroya, koma úr øllum herðashornum í heiminum. Úr Swazilandi, Noregi, Kekkia, Hollandi, Makedonina, Portugal, Kroatia, Finnlandi, Litavia, Japan, Póllandi, Suður-Afrika, Lesotho, Estlandi, Frankaríki, Korea, Írlandi, Sveits, Kina, Ungarn, India, Eysturríki, Kuba, Libya og Avstralia.

Út frá hesum yvirlitinum at døma er valla nakar ivi um, at her er talan um eitt sera breitt lið av sendiharrum, sum røkka yvir so gott sum allan heimin.

Millum aðrir er eisini litaviski sendiharrin í Føroyum. Og Føroyar skulu jú spæla landsdyst móti júst Litavia mikukvøldið á Svangaskarði.

Skráin fyri vitjanina hjá sendiharrunum býður upp á mangt áhugavert. Og hóast vit eru komin út í september, so kann ikki sigast annað, enn at tey higartil hava verið heppin í veðrinum.

## Tøtt skrá

Týsdagin vitjaðu tey Tinganes, har tey fingu søguliga partin frágreiddan, síðani vitjaðu tey Løgtingið og løgmann, Anfinn Kallsberg, Tórshavnar Býráð og Listaskálan. Alt hetta varð gjørt fyrrapartin, so skráin má sigast at vera tøtt hjá teimum.

Landsbankin bjóðaði teimum síðani døgurða, har Sigurd Poulsen, landsbankastjóri, síðani helt ein fyrilestur um búskap, handil og ídnaðin her á landi.

Seinnapartin týsdagin gekk leiðin fyrst á Fróðskaparsetrið, síðani til Náttúrugripasavnið og Fiskirannsóknarstovuna.

Um kvøldið var Anfinn Kallsberg vertur við ein døgurða á Platform.

Í dag er ferðaliðið í Klaksvík, har tey millum annað vitja Christianskirkjuna, nýggja kryvjivirkið og býráði. Klaksvíkar býráð bjóðar eisini til ábit á Hotel Norð á Viðareiði. Leiðin gongur úr aftur Klaksvík seinnapartin klokkan trý. Tá fara tey til Gøtu at vitja Tøting.

Komin aftur til høvuðsstaðin gongur leiðin til Fornminnissavnið, áðrenn tey at eta saman við ríkisumboðskvinnuni, Birgit Kleis.

Morgindagurin fer millum annað við eini vitjan til Kirkjubøar og á Fiskasøluni.

Seinnapartin fáa sendiráðharrarnir høvi til at fara runt sjálvi. Tá er skráin liðug, og tað allarseinasta á skránni hjá teimum er ein døgurði á hotel Føroyum um kvøldið.

Ferðalagið fer av aftur landinum leygarmorgunin.

# Svartur skermur kostar starvið

**Nógv týðir uppá, at teknisku trupulleikarnir hjá Sjónvarpi Føroya nú hava fingið fylgjur fyri tekniska stjóran, Dávur Isfeldt**

STARV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Sosialurin hevur frætt frá sera álítandi keldum, at tekniski stjórin í Sjónvarpi Føroya, Dávur Isfeldt, er farin úr starvinum. Hetta vildi sjónvarpsstjórin, Mikkjal Helmsdal, tó ikki váttað.

– Eg havi onga viðmerking til hatta beint nú, var einasta svar Sosialurin fekk, tá roynt varð at fáa tíðindini váttað ella avsannað. Sjónvarpsstjórin vildi ikki gera nakra viðmerking til nakað sum helst hesum viðvíkjandi.

Um so er, at tíðindini eru sonn, so kann gangast út frá, at hetta er ein beinleiðis avleiðing av brølaranum hjá Sjónvarpi Føroya í sambandi við dystin leygardagin í millum Skotlandi og Føroyar. Tá føroyingar bert sóu brot av dystinum í sjónvarpinum.

Men sum sagt so eru hesi tíðindi ikki váttað enn, men nógv bendir á, at tey eru sonn.



